# handVERKARIN

2012 BLAÐ NR. 41 HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# STØÐAN Í SAMFELAGNUM



*Eli Brimsvík*

Eg haldi, at tíðin er komin til, at fakfelagsrørslan tekur í egnan barm, og setur seg saman við tí fyri eyga at stovnseta eitt føroyskt LO.

Tíðin hevur víst okkum, at hetta er tvingandi neyðugt. Hví? Tí, at teir, sum nú ráa fyri borgum, hava eitt einans endamál, og tað er at niðurbróta fakfelagsrørsluna – stig fyri stig.

Hetta muga vit ikki lata teir fáa loyvi til. Lat okkum vísa teimum, at vit standa saman, og at vit ikki góðtaka hvat sum helst.

Vit eiga at krevja, at øll eru líka fyri landsins lógum – eisini politikarar. Teir eiga ikki at fáa einar 15 ferðir so nógv í koyrifrádrátti sum Palliba og Marsanna. Og teir eiga heldur ikki eiga at fáa eftirløn – uttan so – at teir sjálvir/sjálvi rinda inn fyri hana sum øll onnur her í samfelagnum.

**Í blaðnum hesa ferð:** **síða**


Danial Pauli Djuhuus, formaður í Landsfelag Handverkaranna . . . . . . . . . . . . . . . forsíðumynd
Ársaðalfundur Eftirlønargrunsins fyri 2011 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . s. 4
Ársaðalfundur Havnar Handverkarafelags . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . s. 20



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag · Stoffalág 60 · Box 203 · 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Media · **Umbróting, prent og liðugtgerð:** Føroyaprent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
**Skrivstovutíð:** Mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15.
Telefon 35 48 00 · fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverk@handverk.fo · www.handverk.fo

# ER KAOTISK

Hvat líkist tað, at einans 16 ár á tingi gevur fulla tænastumannapensjón meðan øll onnur skula arbeiða útvið 40 ár fyri at uppnáa fult gjald? Tað er líka við, at skattafríir ágóðar, so sum borðfæ og koyripeningur eru størri enn vanliga lønin soleiðis, at lønin nú er eitt ískoyti.

Alt hetta eru teir borgarligu garantar fyri. Samstundis tosar man í ramasta álvara um at fáa ungar og væl útbúnar føroyingar heimaftur eftir lestur. Hvat skula tey koma aftur til? Kom fyri stuttum at tosa við ein ungan væl útbúnan føroyskan lækna, sum starvast uttanlands. Spurdi um hann ætlaði at koma heim aftur at starvast. Svarið var, at tað var tað, hann best kundi hugsa sær, men at tað ikki var ein møguleiki so leingi hettar politiska sirkusið við vina- og kenningapolitikki heldur áfram, og hann helt fram, at hesa áskoðan hevur ein stórur partur av teimum ungu undir útbúgving. Hetta má sigast at vera greið tala, og er helst ein orsøk til, at fólkatalið minkar.

Vilja vit landinum væl, so eiga vit at vísa hesum flokkum durafjórðingin til komandi val, og lata teir vera í andstøðu í fleiri valskeið.

Føroyar hava brúk fyri nýggjum politikki, og tí eiga teir flokkar, ið nú sita í andstøðu at fáa valdið. Tað er onki at ivast í, at teir eru førir fyri at fáa skútuna á rættkjøl aftur.



*Mynd frá aðalfundi Hanvar Handverkarafelags*

Málarameistari
RANSIN N. DJURHUUS
TEL. 26 46 82

# ÁRSFRÁGREIÐING EFTIRLØNAR



*Sofus Joensen, formaður*

## Sofus Joensen, formaður:

Í hesi ársfrágreiðing fari eg at greiða frá tí, ið farið er fram í Eftirlønargrunni Havnar Handverkarafelags í 2011.

Lat meg fyrst nevna, at í hesum føri er talan er um eitt baldrut ár á fíggjarmarknaðunum og tí eisini lutvíst hjá Eftirlønargrunni Havnar Handverkarafelags.

Árið 2011 prógvaði, at allur fíggjarheimurin hongur ógvuliga tætt saman; tá tað gongur galið einastaðni, so fær tað í dag avleiðingar kring allan knøttin.

## Fleiri lond eru um at hokna

Eitt er, at Eik Banki her heima hjá okkum kollsiglir – tað merkja vit alt fyri eitt her heima, vit merkja tað lokalt alt eftir, um vit hava við banka ella sparikassa at gera.

Men tá so heil lond so sum Grikkaland, Írland, Spania og Italia standa og vippa og ikki vita, hvønn veg tey skulu fara – ella sagt á ein annan hátt: Ikki vita um tey eru keypt ella seld – ja, so er ikki so løgið, at vit standa spyrjandi, og skimast rundan um okkum. Tá gerst tað torført at finna nakað, sum er nóg trygt at seta okkara pening í, væl at merkja so, at peningurin bæði er tryggur, og, at vit fáa sum mest fyri peningin.

## Statsobligasjónir

Viðvíkjandi Eftirlønargrunninum er tað nú einaferð soleiðis, at næstan allur okkara peningur stendur í statsobligasjónum. Tað merkir, at vit hava lánt peningin út til statir og lond.

Vit hava valt at verið so varnir, sum tað nú einaferð er møguligt við íløgunum hjá Eftirlønargrunninum. Og lat meg so beinanvegin viðganga, at vit heldur ikki eru farnir eftir tí heilt stóra vinninginum hesi árini. Fyri at gera eina íløgu við størst møguliga avkastinum, so má ein vera villigur til at taka ein stóran váða upp á seg. Og vit skulu eisini gera okkum púra greitt, at tað er har teir størstu vandanir eru fyri at missa pening. Vit hava har afturímóti altíð haft fyri eyga, at verið varnir við

okkara íløgum. Vit hava tí heldur ikki í 2011 mist nakran pening, men vunnið pening.

### Eftirlønarskipanir í framtíðini

Aftur í ár siga okkara fólkavaldu, at tað kemur ein nýggjur pensjónsreformur – t.v.s. at okkara politikarar umsíðir eru vaknaðir og hava samtykt millum annað, at hvør einasti lønmóttakari skal gjalda inn í ein ella annan góðkendan eftirlønargrunn.

Nakrar aðrar broytingar eru eisini komnar til eftirlønargrunnar, sum t.d., at ongin kann gjalda meira enn 25.000,- kr. um árið til eina kapitalpensjón.

Aðrar broytingar eru eisini ávegis. Eitt nú, at um ikki so langa tíð, fer politiski myndugleikin – Føroya Løgting – at samtykkja eina lóg, ið hevur til endamáls, at øll, sum hava inntøku í Føroyum, skulu gjalda í minsta lagi 15% inn í eina ella aðra eftirlønarskipan.

### Fyrimyndarligum eftirlønargrunnur

Í hesum sambandi er tað ein tryggleiki, at vit longu hava skipaði viðurskifti á økinum, við einum fyrimyndarligum eftirlønargrunni og góðum sáttmálum á økinum. Tað er onki at ivast í, at hann verður góðkendur og kann lúka øll krøv, sum tá verða sett.

Her er at nevna, at vit tá helst verða langt framman fyri mong onnur føroysk fakfeløg, sum tá verða noydd at leggja alla orku í at fáa greið viðurskifti á hesum øki. Og tí kanska ikki fáa møguleika at taka sær av øðrum viðurskiftum, sum fakfeløg eiga at taka sær av. Tá verða vit í einari góðari støðu í mun til tey.

### Broytingin hjá samgonguni

Broytingin hjá verandi samgongu at skatta pensjónsinngjøldini hevur sera stóra neiliga ávirkan á, hvussu nógv framtíðar løntakarar fara at fáa í pensjón. Skatturin á pensjónina verður hægri, og tí verður missurin í túsundavís av krónum á ellisárum fyri eitt nú handverkarar, arbeiðsmannin, heilsuhjálparan, pedagogin, skrivstovufólkið, vaskikonuna og sjúkrarøktarfrøðingin.

### Viðmerkingarnar til lógaruppskotið

Hetta verður eisini staðfest í viðmerkingunum til lógaruppskotið.
Í viðmerkingunum stendur:
„Skattað eftirlønarinngjald og skattafrítt útgjald viðførir, at botnfrádrátturin hvørvur saman við broyting av skattatíðspunktinum. Sami persónur fær tí í veruleikanum minni at liva av enn við gomlu skipanini. Uppskotið fær helst sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar við tað, at skattaviðurskiftini broytast munandi hjá lág- og miðal lønarfólki."

### Bíðið við uppskotinum

Tí var okkara einasta boð: Bíðið við uppskotinum.

Fyrivarnini frá pensjónsnýskipanarbólkinum eru fleiri. Millum annað sigur bólkurin at:
„Verður eftirlønaruppsparing skattað við inngjaldi, so verður eftirlønarskatturin goldin av framtíðar borgarum. Skattagrundarlagið verður tí tengt at, hvussu nógv eru í arbeiðs-

styrkini til ta tíð. Inntøkugrundarlag landskassans verður tí ikki so trygt, sum við tí gomlu skipanini“.

Og kommunurnar, serliga tær kommunur har nógvir pensjónistar fara at búgva, verða stak illa fyri, tí tær fáa ongan skatt útgoldnan. Skatturin er longu goldin í Landskassan, og brúktur til at fíggja ein skattalætta til nakrar háinntøkur.

## Kostnaðurin

Eitt annað, ið hetta eisini viðførir er, at kostnaðurin av at reka grunnin hækkar. Ikki tí – í krónum er kostnaðurin tann sami – men higartil hava vit tikið 5 % av inngjaldinum til rakstur, men tá vit nú fáa 40 % minni í inngjaldi, so strekkir hetta ikki til meira, og avleiðingin verður helst, at vit koma at seta prosentið upp. Eg kann taka eitt dømi her: Um vit fyrr fingu 100,- kr. inn í grunnin, so tóku vit 5% av (= 5,- kr.) til rakstur.

Nú er støðan tann, at Jørgen Niclasen fer við teimum fyrstu 40,- krónunum, so nú eru bert 60,- kr. eftir, og 5% av 60,- kr. er bert 3,- krónur, og er hetta ikki nóg mikið til rakstur. Fyri at fáa somu upphædd at reka



Framhald á s. 8




Linde Gas | AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútgerð
Kolgass

*Upplatingartíðir :*
móna, -friggjadag
8:00 - 17:00
Tlf, 315544
e-mail: Gassola@gassola.fo
**www.gassola.fo**



politiska hjálparloysið sett inn í staðin. Fyri at rætta hesa íkomnu støðu, er fakfelagsrørslan farin at tosa um, at skipa øll fakfeløgini í eitt sterkt felag, eitt føroyskt LO.

## Greiða arbeiðsorðing

Men eitt føroyskt LO má hava eina greiða arbeiðsorðing, – har má standa greidliga, hvat fyri arbeiðsuppgávur eitt slíkt felag skal hava og ikki minni týðandi, hvørjar uppgávur felagið skal halda seg frá. Avbjóðingin er at finna rætta valdsbýtið í einum komandi LO.

– Hvussu fáa smáu fakfeløgini hóskandi umboðan, og hvussu fáa stóru fakfeløgini demokratiska umboðan. Tað má eisini finnast ein loysn á.

Sum tað sær út nú, so hava allir flokkar í samgonguni selt síni grundleggjandi virðir. Fyri hvønn prís, hava vit hug at spyrja?

**Sambandsflokkurin:**
Sambandsflokkurin hevur játtað flatskatt, skatting av eftirlønum við inngjald og parkering av etiskum málum fyri at hækka blokkin.

**Fólkaflokkurin:**
Fólkaflokkurin hevur játtað at hækka blokkin og at parkera etisk mál fyri at fáa flatskatt og skatting av eftirlønum við inngjald.

grunnin fyri, mugu vit nú helst taka 8,3% av hvørjum 100 krónuseðli.

## Føroyskt LO

Verður rætt atborið er ikki óhugsandi, at eitt føroyskt LO er ein gongd leið. Inntil nú hevur ein lítil partur av fakfelagsrørsluni forðað fyri, at lønirnar eru lækkaðar, samstundis sum prísirnir eru hækkaðir.

Grundgevingarnar fyri, at lønirnar ikki kunnu fylgja prísvøkstrinum í landinum eru tengdar at einum halli á fíggjarlógini. Heldur enn at síggja møguleikar og breiðka inntøkugrundarlag landsins, velja tey ráðandi at knúska arbeiðstakaran. Prísvøksturin, ið eigur at vera høvuðsgrundarlagið undir samráðingunum verður skúgvaður til viks, og

# GRUNSINS FYRI 2011



**Miðflokkurin:**
Miðflokkurin hevur játtað at hækka blokkin, skatting av eftirlønum við inngjald og flatskattin, fyri at tryggja sær, at etisk mál ikki verða viðgjørd næstu fýra árini.
**Sjálvstýrisflokkurin:**
Sjálvstýrisflokkurin hevur játtað at hækka blokkin, flatskatt, skatting av eftirlønum við inngjald og parkering av etiskum málum, fyri hvat?

## Fólkaræðið

Sagt verður um fólkaræðið, at vit fáa tað, ið vit hava valt. Men er tað nú so einfalt ?

Hava sambandsveljarar valt flatskatt, skatting av eftirlønum við inngjald og parkering av etiskum málum?

Hava fólkafloksveljarar valt at hækka blokkin og at parkera etisk mál?

Hava veljararnir hjá Miðflokkinum valt at hækka blokkin, skatting av eftirlønum við inngjald og flatskatt?

Og hvussu kann ein flokkur, ið byggir alt sítt virksemi á eitt Kristi grundarlag, hava eitt ynski um, at vit skula hava eitt samfelag uttan etikk? Hvar er næstin í einum samfelag, ið ongan etikk hevur?

Hava veljararnir hjá Sjálvstýrisflokkinum valt hækkan av blokkinum, flatskatt, skatting av eftirlønum við inngjald og parkering av etiskum málum?

Hevur Føroya fólk valt eitt samfelag uttan etikk?

## Etikkin oman eftir ánni

Nú hava vit verið á valið, og vit hava valt umboð, ið skulu vara av okkara samfelagi. Hesi umboð eiga at vera fyrimyndir fyri borgaran í okkara samfelag. Tey eiga at vera fremst í kjakinum um, hvørji virði hava týdning í okkara samfelag og, hvat tað er fyri samfelag, ið vit ynskja, at okkara børn vaksa upp í.

Hvat hendir so við einum samfelag, tá ið tey, ið skula leiða og vara av samfelagnum, senda etikkin oman eftir ánni og út á hav?

Hvørji virði hevur ein samgonga, har allir flokkar hava slept sínum grundleggjandi virðum?

Hvussu kunna borgarar í einum samfelag, har ovasti politiski myndugleikin hevur lagt etikkin frá sær, hava álit á politiska myndugleikanum?

Andstøða, fakfeløg, serfrøðingar og borgararnir hava í eina tíð roynt at fingið orð á samgonguna, tó uttan úrslit.

Fólk hava mótmælt uttanfyri Tingið. Andstøðan hevur sett spurningar innanfyri, og serfrøðingar hava greitt og greina, hvørjar fylgjur gongda leiðin fer at hava fyri Føroya fólk, alt við sama úrslitið – ongin steðgar á og ongin svarar.

## Vónandi læra veljararnir

Vónandi kunnu føroyskir veljarar læra nakað av verandi politisku støðu. Meiningin við einum borgarligum flokki er at føra borgarligan politikk – punktum. Um man velur ein borgarligan flokk, so merkir tað, at man velur borgarligan politikk. Men kanska er trupulleikin, at nógv fólk ikki skilja hvørjir flokkar eru borgarligir, og at somu fólk slettis ikki skilja hvat borgarligur politikkur er? Well, vónandi skilja tey tað nú …

## Kappingarneytar

Í 2011 merktu vit, at vit fáa meira og meira kapping frá Betri Pensjón og LÍV, og nú eisini frá bankunum.

Eitt, ið skrivstovufólkini hjá okkum hava lagt til merkis er, at tað eru fleiri og fleiri limir, sum ringja inn og spyrja, hvussu teir eru tryggjaðir og, hvussu teirra eftirlønarviðurskifti eru.

Tað, sum vit eisini hava lagt til merkis er, at báðir teir stóru bankarnir eru farnir at seta sum treyt fyri at veita lán, at kundarnir hjá



*Framhald á s. 14*




**Betri pensjón tryggjar tær eina munagóða samansparing, sum leggur lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.**

- Vit samanseta pensjón og tryggingar eftir tínum tørvi
- Vit umsita tína pensjón við størsta vinningi fyri eyga
- Umvegis Netpensjón hevur tú fult gjøgnumskygni



**Savnar tú tryggingar og pensjón hjá okkum, kanst tú fáa upp til 32% í avsláttri.**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón

**Ídnaðar- og garaguhurðar**

**Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92**

**Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður**

Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn

**rør-tænastan**

v/EYÐFINN HANSEN TLF. 22 81 80

*Vatn·Hiti·Sanitet·Ventilatión*

## Ein depil innan skipatænastur

www.mest.fo

At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.

Men **MEST** er eisini so nógv annað.

**Vit bjóða m.a.**

- Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
- Landsins størstu goymslu av eykalutum
- Projekt- og teknistovuarbeiði
- Stórar bedingar og turrdokk
- Leigu av sleipibátum og kranum
- Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)






**MEST**

**MEST**
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo

Húsavarðartænastan
10 ár
2001 - 2011



# Ogna tær tín egna húsavørð

*- bæði virkir, stovnar og privat kunnu ogna sær ein húsavørð*

sansir.fo

Vit bjóða virkjum, stovnum og privatum kundum fasta avtalu um ein tímasettan húsavørð. Um ásetta tímatalið ikki verður brúkt ein mánaða, kunnu tímarnir flytast til komandi mánaða, so tað ber til at savna tímar saman.

Vit taka okkum av øllum hugsandi húsavarðar-uppgávum. Er nakað átrokandi, eru vit á staðnum beinanvegin.

Somuleiðis eru vit til taks alt samdøgrið, tá ið bráðneyðugt arbeiði skal gerast.

*Vit átaka okkum eisini alt arbeiði í samband við bygging og umbygging av: skúlum, sethúsum, raðhúsum, barnagørðum, íbúðarhúsum.*

*Harafturat alla gólválegging: trægólv, teppi, linoleum og vinyl - eisini til vát- og baðirúm.*

---

## Reinsa við turr-ísi



NÝTT

Reinsar blámusopp, maskinur, el-lutir og kann eisini nýtast til sandblásing.
Brúkar ikki vætu. Ring og hoyr nærri.

## Betong-saging



NÝTT

Við okkara nýggju Diamant-ketusag kunnu vit skera tjúkdir upp í 57 cm.
Ring og hoyr nærri.

---


**Húsavarðartænastan Spf**
Brattalíð 8 | Tórshavn
hvt@olivant.fo | Tel. 29 00 29


**Húsavarðartænastan**

teimum eisini hava síni eftirlønarviðurskifti inni hjá teimum.

Nú er tað einaferð so, at eftirlønin hjá okkum er knýtt at sáttmálanum, og sigur hann greitt, at ert tú limur í Havnar Handverkarafelag, so skalt tú vera tryggjaður hjá Havnar Handverkarafelag, og eftirlønin skal í grunnin hjá Havnar Handverkarafelag. Vit heita á limirnar um at lata okkum frætta um tað er onkur, ið kemur út fyri hesum.

## Renta og avkast

Tá vit tosa um rentur og avkast, so mugu vit viðganga, at í ár er ikki so nógv at deila út av.

Lat meg í stuttum royna at greiða frá, hvussu vit áseta rentuna: Hetta verður gjørt á tann hátt, at allur peningurin, sum vit vinna av íløgum verður settur til síðis sum eginpeningur.Tey seinastu árini hava vit nýtt ein part til rentu og ein part til at styrkja grunnin við. Higartil hevur tað gingið rættuliga væl, og høvdu vit uppbygt okkum ein rímiliga stóran eginpening soleiðis, at vit kundu hava eina rættuliga stabila miðalrentu, uttan mun til, hvussu avkastið var.

Tað sum so hendi í 2011 var, at Tryggingareftirlitið setur grunninum tað krav, at grundarlagsrentan má lækkast við einum



hálvum prosenti, og kostar hetta kravið grunninum umleið 5 mió. kr.

Fyri at sleppa undan at taka lán til hesar 5 mió. valdi nevndin at taka peningin av eginpeninginum. Hetta viðførir so – saman við tí, at avkastið í 2011 ikki var stórt, at vit meta, at vit bert kunnu veita eina rentu uppá 1,5 %.



## Hygg trý ár aftur í tíðina

Tá tað er sagt, mugu vit ikki gloyma, at hyggja vit bert trý ár aftur í tíðina, so er tað so, at vit hava veitt okkara limum eina miðalrentu upp á 3,7 % fyri hvørt ár. So vit liggja á einum heilt góðum støði samanborið við teir grunnar og pensjónsfeløg, ið vit sammeta okkum við.

Og tað, sum vit eisini skulu minnast til er, at okkara eftirlønargrunnur er ein sera lítil grunnur, sum stendur einsamallur. Tað er ongin, sum eigur hann uttan vit sjálvi. Tað er tí heldur ongin, sum kemur og koyrir pening í grunnin, um tað gongur galið. So vit hava bara okkum sjálvi at líta á. Og so tað, sum vit altíð mugu hava fyri eyga; tað sum hevur størstan týdning er: At peningurin, sum stendur í eftirlønargrunninum, er peningur, ið vit hava samlað saman – og tað, ið vit skulu liva av, tá vit eru blivin gomul.

## Handlað varisliga

Nevndin í eftirlønargrunninum hevur handlað varisliga. Serfrøðingar meta, at tað er grammheit, ið er orsøkin til, at vit í dag hava hesa heimsumfatandi fíggjarkreppu. Okkara fremsti tanki má tí vera, at tann peningur, ið stendur í eftirlønargrunninum, má og skal vera tøkur, tá vit koma í eftirlønaraldur, og vit skulu hava eftirlønina útgoldna.

Vit hava eisini ta trygd, hóast vit standa einsamøll, og ikki hava ein banka at styðja okkum, at bæði aktuarur, grannskoðari og Tryggingareftirlitið fylgja væl við gongdini í grunninum.

Tapini kunnu – um ein tekur kjansir og illa vil til – gerast ovurhonds stór. Og sum eg

fleiri ferðir áður havi sagt, so eigur eftirlønargrunnurin ikki peningin. Vit eiga hann øll. Tí er best í flestu førum at binda um heilan fingur. Grunnurin umsitur jú bara peningin fyri okkum, og tí eiga vit, at vera varin – sera varin. Tað, sum vit alla tíðina mugu og skulu hava í huga er, at eftirlønargrunnurin til eina og hvørja tíð heldur seg til sínar viðtøkur, fer væl um tann pening, hann umsitur, so hann altíð kann gjalda hvørjum sítt. Hetta má vera vørumerki grunsins – okkara vørumerki.

## Íløgur

Tá vit gera íløgur í eftirlønargrunninum, kunnu vit ikki altíð gera tær íløgur, sum síggja út til at kasta mest av sær, ella sum eru mest lovandi í løtuni. Vit mugu vera sera varin. Hyggja vit rundan um okkum so síggja vit, at stjórar og teirra nevndir verða drigin í rættin, m.a. fyri fíggjarundandrátt, og fyri ikki at hava umgingið pening á rættan hátt. Hetta leiðir meg til at koma við einum góðum ráði til tykkum, sum seta fólk at umsita tykkara pening í okkara felag, ella okkara eftirlønargrunni. Tað mugu vera fólk, ja eldsálir, sum veruliga brenna fyri at gera eitt framúr gott arbeiði. Og sum ikki gloyma, at tað til tíðir er eitt ótakksamt starv.

Sama kunnu vit siga við fólk, sum bjóða seg fram at koma í slíkar nevndir. Tit skulu vita, at ábyrgdin er stór.

Vit byrjaðu í 2010 at justera okkara íløgur, so vit kundu lyfta okkum eitt sindur longri



upp, sagt við øðrum orðum, fáa eitt sindur meira fyri okkara pening. Tí ikki tykkum at siga so er rentan næstan komin niður á null-punktið. Fara vit so at kanna eftir, hvussu hevur hilnast, so síggja vit, at í 2010 gekk tað sera væl. Í 2011 ikki so væl, men lat meg beinanvegin so eisini nevna, at vit fingu fleiri ábendingar um, at tað nokk var rætt at justera íløgurnar.

Viðvíkjandi trygdini kann eg nevna, at vit hava fingið játtan frá Dátueftirlitinum, at okkara skipanir eru góðkendar og tryggar.

## Ábyrgd

Eg fari hervið at heita á tykkum um sjálvi at ansa eftir, at tit fáa tað útgoldið, ið sáttmálin sigur. T.v.s. at arbeiðsgevarin flytur tað, sum hann eigur at flyta.

Her hugsi eg serliga um, at tit kanna eftir um eftirlønin, sum er ein partur av lønini hjá tykkum, eisini verður flutt til felagið.

Sjálvandi kannar skrivstovufólkið eftir, at alt verður goldið, men har kann okkurt fara framvið, uttan at tað verður fangað.

Hetta eru tykkara pengar, og so skulu vit minnast til, at hetta eftir hondini er ein stórur partur av lønini. Og harvið eisini tykkara ábyrgd.

## Nevnd grunsins

Síðani aðalfundin í 2011 hava nevndarlimirnir verið hesir: Sofus Joensen, Marita í Brekkunum, Eli Brimsvík, Koos Kamminga og Hans Jákup Johannesen.

Í 2012 standa Eli Brimsvík og Hans Jákup Johannesen fyri vali. Hans Jákup Johannesen hevur boðað frá, at hann ikki tekur við afturvali.

Í hesum sambandi er hóskandi at siga nøkur orð um, hvat arbeiði hjá einum nevndarlimi í Eftirlønargrunninum inniber.

Grunnurin er í stóran mun lógarreguleraður, og er undir rættuliga strongum eftirliti av Tryggingareftirlitinum. Men tað eru eisini onnur viðurskifti, ið gera seg galdandi.

Fyrst er at nevna, at tað má vera eitt krav, at allir nevndarlimir eru væl kunnaðir um tær lógir og reglur, ið eru galdandi fyri grunnin.

Sjálvandi fáa nevndarlimir alt tilfar, sum neyðugt er at kunna seg um. Umframt hetta verður av og á skipað fyri skeiði, sum er ætlað at styrkja førleikarnar hjá nevndarlimunum. Tá verður vanliga heitt á advokat um at gjøgnumganga viðurskifti, ið hava stóran týdning fyri nevndararbeiði.

Tað er ikki nóg mikið, at t.d. stjórin, nevndarformaðurin og kanska onkur nevndarlimur kenna krøvini. Øll nevndin skal kenna galdandi krøv. Um hetta ikki er galdandi, so kunnu vit í ringasta føri vera revsa fyri møguligar skeivar avgerðir.

Eitt tað feskasta dømi á hesum øki er, tá eitt starvsfólk í Eik Banka var valt sum starvsfólkaumboð í Eik Grunninum.

Tað er ikki nøktandi at siga, at ein ikki visti alt til fulnar, tí lógin sigur: „Setur tú teg í eina nevnd, ert tú undir ábyrgd.“ Nú kann hetta tykjast ræðandi, men hetta er bara veruleikin.

At enda fara vit at nevna, at allir nevndarlimir skulu hava tað, sum nevnt verður reina straffiattest.

# KETILIN

## ...NÝTIST AT SIGA MEIRA?

JÄSPI-ketilin er kendur í Føroyum. Við mest seldum ketlum á føroyska marknaðinum nýtist ikki at siga meira...

JÄSPI-ketilin fáa tygum hjá Mariu Poulsen.

Ring 312000 og fá eitt óbindandi tilboð!



JÄSPI

**Maria Poulsen**

Tel 312 000 | Fax 315 970 | mp@mp.fo | www.mp.fo

*EftirlønargrunnurHavnarHandverkarafelags*
*Àrsfrásøgn 2011*

## Samandráttur av ársfrásøgn fyri 2011

### Rakstarroknskapur

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| Eftirlønargjøld | 30.119.595 | 24.330.358 |
| Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. | 6.263.696 | 5.330.057 |
| Virðisjavningar | -3.953.488 | 1.064.799 |
| Fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi | -577.258 | -486.247 |
| **Úrslit av íløguvirksemi til samans** | **1.732.950** | **5.908.609** |
| Útgoldnar veitingar | -1.292.271 | -2.113.339 |
| Broyting í eftirlønaravsetingum | -8.301.329 | -2.902.337 |
| **Útgoldnar veitinga og broytingar í avsetingum til samans** | **-9.593.600** | **-5.015.676** |
| Fyrisitingarkostnaður | -1.341.382 | -1.313.493 |
| Flutt úrslit av íløguvirksemi | -1.398.491 | -4.664.357 |
| **Tryggingartekniskt úrslit** | **19.489.072** | **19.245.441** |
| Íløguúrslit av eginognini | 1.398.491 | 4.664.357 |
| Skattur av ársúrsliti | 0 | 0 |
| **Ársúrslit** | 20.887.563 | 23.909.798 |

## Fíggjarstøða hin 31. desember 2011

| | | |
|---|---|---|
| **OGN** | | |
| **Fíggjarligar íløguognir** | | |
| Aðrar fíggjarligar íløguognir til samans | 180.461.623 | 151.620.537 |
| **Fíggjaríløgur til samans** | 180.461.623 | 151.620.537 |
| **Ogn í umferð** | | |
| **Tøkur peningur** | 5.546.574 | 5.190.747 |
| **Ogn í umferð til samans** | 5.546.574 | 5.190.747 |
| **OGN TIL SAMANS** | 186.008.197 | 156.811.284 |
| **SKYLDUR** | | |
| **Eginogn til samans** | 9.195.618 | 12.322.141 |
| **Ábyrgdarlán** | 5.000.000 | 5.000.000 |
| Limakontur | 131.940.986 | 107.926.900 |
| Eftirlønaravsetingar, solidariskar | 38.236.667 | 29.935.338 |
| Onnur skuld | 1.634.926 | 1.626.905 |
| **SKYLDUR TIL SAMANS** | 186.008.197 | 156.811.284 |

# ÁRSAÐALFUNDUR HAVNAR HANDVERKARAFELAGS

## Eli Brimsvík, formaður:


Eli Brimsvík, formaður

Ársaðalfundur Havnar Handverkarafelags varð hildin í hølum felagsins í

Stoffalág 60 mikudagin 28. mars.

Skrá sambært §21 í lógum felagsins. Í ársfrágreiðing formansins segði Eli Brimsvík m.a.

Tíðin gongur skjótt, og eru vit longu aftur her at halda ársaðalfund, sum er nummar 63 síðani felagið var stovnað.

Árið 2011 var merkt av niðurgongd á arbeiðsmarknaðinum, arbeiðsloysið var í mars 2012 komið uppá um leið 1659 fulltíðar arbeiðsleys, av hesum vóru 214 við handverkaraútbúgving. Vit mega bert vóna, at gongd kemur aftur á samfelagið.

## Pelagic í Kollafirði

Eitt sum hevur verið afturvendandi, er uppisjóvarvirkið í Kollafirði. Har virkar tað sum tað reina „Wild West".

Hollendsku eigararnir halda – milt sagt – hánt um føroyskar sáttmálar, og reglur. Teir gera sum teimum listir, og um og tá ið menn talaðu at vóru teir uppsagdir vegna sparingar. Vit høvdu fleiri fundir við leiðsluna um vantandi reglur og sáttmálabrot, og altíð vóru teir fittir og fyrikomandi, men so er eisini alt sagt. Teir vóru als ikki til at hava við at gera. Sum tit helst allir vita, tóku vit avleiðingar av hesum og meldaðu virkið. Fyrst til Útlendingastovuna, og síðani til løgregluna, men eisini har virkar tað sum, at vit renna pannuna ímóti.

Hóast fleiri áheitanir gekk tað rúm tíð áðrenn løgreglan fór til verka, men enn er eingin niðurstøða – virkið heldur áfram við óregluseminum. Fyri stuttum tóku teir útlendingar inn á virkið akkurát sum tað passaði teimum, og arbeiðs- og uppihaldsloyvi er fyri teir ein býur í Kina. Eisini er komið fram, at teir hava innrættað eitt rúm í erva á virkinum til hesar útlendingar at sova í. So ein kann bert ímynda sær, hvat kann henda um illa vil til – um t.d. eldur kemur í – ella um leki kemur í frystiannleggið. Vit mugu ásanna, at tað er sum at sletta vatn á gás at tosa við

# Nýggjan køk?

- vit hjálpa tær at finna dreymakøkin



www.2x3.fo







**NÝGGJUR SVARTUR EKSLUSIVUR OG ELEGANTUR KØKUR**

Nýggjasti mótin innan køkar í løtuni er svart og hvítt. Tiskil hevur Aubo framleitt nýggju lúkuna Melinga Svart, sum beinan vegin bleiv ein bestseljari. Melinga fylgir mótanum, køkurin er einkul, stílreinur og longu blonku handtøkini eru eitt grafiskt íkast til beinu linjurnar.

Vit hjálpa tær fegin við at tekna køkin, soleiðis at hann hóskar júst til tín. Tú skalt bara taka mát av rúminum. Til ber eisini at siggja fleiri køkar frá á www.2x3.fo.

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

Heykavegur 4 · 110 Tórshavn · Tel. 311250 · 2x3@2x3.fo · www.2x3.fo

# ÁRSAÐALFUNDUR HAVNAR



myndugleikarnar. Men nú annar stjóri er settur á virkinum er vend komin í. Eftir áheitan frá nýggja stjóranum hava maskinmenninir og virkið nú gjørt setanaravtalu, sum inniheldur setanartreytir, løn og aðrar viðkomandi og relevantar ásetingar.

Og eftir ynski frá báðum pørtum er hetta eisini góðkent av okkara felag. Tað sigst, at viðurskiftini annars eru við at koma uppá pláss. So er at vóna at arbeiðsfriður verður har.

## Bati

Nú er umsíðir semja gjørd við Meistarafelagið um sjúkragrunnin „Bata“.

Havnar Handverkarafelag er nú eigari av grunninum. Reglugerðin er broytt samsvarandi hesum, og verður hon løgd fram í kvøld. Samstundis merkir hetta, at samlaða ognin hjá felagnum er økt tilsvarandi.

## Tryggingin

Tá talan er um trygging var 2011 eitt knapt so gott ár. Vit hava haft lutfalsliga nógvar skaðar. Men tað eru jú slíkar umstøður, tryggingin er ætlað til, so ein kann siga, at verri var um eingin trygging var at standa ímóti við.

Aðrir veitarar eru eisini bidnir um at geva boð uppá eina møguliga trygging um vit skuldu ynskt at skift.

Tað er sjálvandi út frá sama skaðastatistikki, sum verandi veitari brúkti. Eisini teirra tilboð var – tá talan er um prís – á sama støði. Nevndin hevur á fundi við m.a. hini feløgini í tryggingini, gjørt av at leingja avtaluna við verandi veitara í eitt ár afturat, tað vil siga til endan av 2012. Hettar er fyri – nágreiniliga – at kanna fyrimunir og vansar við einum møguligum veitaraskifti.

## Limagjald og eftirstøða

Tað hevur nú eydnaðist okkum at fáa meir enn 95 % av limunum at gera gjaldsavtalu við felagið.

Tað hevur so havt við sær at eftirstøðan er minkað og vit meta, at vit koma niður móti nullinum í 2012. Onkur limur vil tó ikki gera slíka avtalu, men vil heldur gjalda limagjaldið pluss eyka kostnað.

## Flatskattur/eftirløn

Tað hevur verið mikið rok viðvíkjandi tí, at landsstýri hevur sett í verk sokallaðan flatan skatt og skatting av eftirlønarinngjøldum.

Hvat antin hetta er skeivt ella rætt skal eg ikki gera meg klókan uppá. Men tá ið tey sum sigast at hava skil fyri hesum kalla hettar óðamannaverk eiga vit at tala at.

Eitt eru tey flestu okkara tó samd um; skattalógin má og skal endurskoðast.

Tá ið fólk ikki fáa endarnar at røkka saman er vandi fyri, at tey heldur flyta av landinum, har treytirnar fyri einari rímuligari tilveru eru til staðar.



Eitt er tó heilt vist; argumentið hjá m.a. Fólkaflokkinum um at lætta um hjá føroyska húsarhaldinum heldur als ikki.

Tá ið tað eru so nógvar familjur, sum ongan ágóða fáa av nýggja skattinum er ikki rætt farið fram. Um ætlan og vilji var til tað, so kundi man saktans lætt um hjá hesum eisini við t.d. at innføra ymiskar frádráttir og annað. Hetta kundi hóskandi verðið gjørt

fyri inntøkur, sum eru undir eina ávísa upphædd.

Eitt annað, sum er hóttandi er skatting av eftirlønarinngjøldum. Her vísa allar kanningar, at tað ikki er økonomiskt forsvarligt at gera so. Kanningar hava víst, at eftirlønin verður millum 10 og 20 % minni enn hon hevði verðið eftir tí leisti, sum var áðrenn broytingarnar vóru gjørdar.

Búskaparfrøðingar baði her heima og uttanlands sagt, at um skatturin bleiv tikin við inngjald, og lagdur til síðis, so kundi tað verða ein fyrimunur fyri landið. Men at taka inn til forbrúk er beinleiðis ábyrgdarleyst.

Eisini haldi eg tað vera átaluvert, at politikarar leggja seg út í sáttmálar á arbeiðsmarknaðinum. Tað er júst tað, ið teir gera. Tað eru partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum hava telva seg til eftirlønargjøld í staðin fyri løn. Men hvør skuldi vita, at vit fingu eina handlingsveika stjórn, og politikarar sum Jørgin Niclassen (ið einans megnaði at fáa góðar 300 atkvøður) komu at sita á valdinum?

Tað høvdu ikki nógv rokna við.

Sum eg fyrr havi nevnt so eri eg av teirri hugsan, at føroyska samfelagið er sjúkt, tá persónar sum til dømis hesin sørvingurin og aðrir við – og undan honum – kunna sita í landsins leiðslu. Tað hevði neyvan borðið til í øðrum londum.

Eftirlønaravtalurnar eru gjørdar á arbeiðsmarknaðinum við fortreytum, sum nú eru burtur. Hetta hevur verandi politiski meirilutin á løgtingi trumfa ígjøgnum.

Tað er klárt, at tá ið okkara – eins og onnur feløg – hava sett eftirlønargrunnar á stovn, var tankin, at limir skuldu fáa so nógv sum gjørligt út aftur í staðin fyri at lata eitt stórt umsitingargjald til teir stóru veitararnar.

Men sum vit altíð hava sagt: Vit arbeiða eftir teimum fortreytum vit hava, væl vitandi at politikkur er ó-útrokniligur.




aquatherm
BAXI
ROYAL SCANDINAVIAN
VØLUND VARMETEKNIK
Nýtt orku-konsept frá Demich og Magn:
Allar orkuloysnir til sethús og virkir á einum staði
Les meira um nýggja orku-konseptið og Magnline oljuketilin á demich.fo/orkuhus
SALTANGARÁ
Heiðavegur 80
Tel. 200 380
TÓRSHAVN
Stiðjagøta 2
Tel. 200 300
VÁGUR
Á Marknoyri
Tel. 560 370
HITAPUMPUR
KETLAR
VENTILATIÓN
RØR OG FITTINGS
BAÐIRÚMSMØBLAR
GOSBAÐ
demich
Saltangará
Tórshavn
Vágur
HVS-VEITARIN
TIL VINNUNA
Okkara døgntænasta er at hitta á tel. 200 345
Tí velja handverkarar Demich
Vit veita bestu ráðgevingina
Vit eru landsdekkandi
Vit umboða dygdarvørur
Vit hava kappingarførar prísir
Vit hava góða kundatænastu
Vit hava døgntænastu
Vit hava framkomnar blikksmiðjur
Á smiðjuni í Havn kunnu vit tilevna inndekningar upp til 3 m
demich
Hiti • Ventilatión • Sanitet
Okkara dygd – tín trygd!
www.demich.fo

Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo

BYGMA
BALSLEV













ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. - Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 - spekt@spekt.fo - www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

# SKAPANDI ÚTBÚGVINGAR

www.tst.fo
skapandi umhvørvi

## Tekniski Skúlin

.... ein virkin og góður samstarvsfelagi

Ein skúli, ið gevur góða og samanhangandi undirvising, í tøttum samstarvi við vinnu og lærling

- vit seta lærlingin í miðdepilin
- vit nøkta tørvin hjá vinnuni
- vit hava høgan námsfrøðiligan og fakligan førleika



Bil
Maskin
Smiðja
El
Timbur
Stil@Snið

Tekniski Skúlin, Postrúm 3239, 110 Tórshavn, tlf. 738050, t-postur tst@skulin.fo, www.tst.fo

# ÁRSAÐALFUNDUR HAVNAR

Tað verður helst ein stór avbjóðing hjá okkara eftirlønargrunni framhaldandi at halda okkum til eitt lágt umsitingargjald. Men tað verður gjørt alt, sum stendur í okkara makt.

Eitt sum hevur verðið týðiligt er, at onnur fakfeløg vísa áhuga fyri okkara skipan, og hava spurt seg fyri um grunnin – við tí tanka – um møguligt samstarv.

## Eftirstøður

Tí verri hendir tað alt ov ofta, at menn og kanska serliga lærlingar koma út fyri at lønin ikki verður goldin rættstundis. Sum oftast lovar arbeiðsgevarin bót og bata, og sigur, at viðurskiftini koma í rættlag.

Lærlingar arbeiða víðari, og vóna tað besta. Tað er ikki so lætt, at fáa læarupláss og tað sær út sum, at summir arbeiðsgevarar gera sær dælt av hesum. Áðrenn man hevur varnast tað er lønareftirstøðan blivin so stór, at bankar og aðrir kreditorar rópa varskó.

Og vit hava uppliva, meir enn eina ferð, at limur hevur vent sær til okkara fyri, at kæra sína neyð um, at teirra bankaráðgevi krevur, at limagjaldið til felagið verður steðga, so leingi ein er arbeiðsleysur. Hetta er ein sera klossutur og átaluverdur máti, sum bankin brúkar, og kann – um illa vil – merkja, at limur kemur illa fyri um brúk er fyri tryggingini. Hetta er enn eitt greitt tekin um,



at bankar einans hugsa um seg sjálvar, og ikki kundan.

Ofta koma menn ikki til felagið fyrr enn skaðin er hendur. Tað er eitt tógvi stríð at fáa pengar frá fyritøkum, sum skylda í allar ættir.

Menn tað skal ikki vera nakar ivi um, at felagið skal veita tað hjálp, sum vit kunna. Annars er ein „tummilfingraregla“, sum sigur, at eigur tú meir enn 2 lønir inni – og tað er trupult at fáa løn – gevst so heldur at arbeiða tí allir partar tapa um hildið verður áfram.

Eitt sum tí verri heldur ikki er ókent fyri okkum er, at lærlingar byrja at arbeiða áðrenn lærubræv er skriva og góðkent. Havast skal í huga, at hesa tíðina fáa teir ikki lærutíð fyri, og tí eigur hetta at verða goldið við vanligari løn, og ikki lærlingaløn. Okkurt rættarmál koyrir enn, men annars er ikki nakað annað komi í árinum.

## Samanlegging við FHF

Í formansfrágreiðingini í 2009 nevndi eg, at vit saman við Landsfelagnum, høvdu havt fund við FHF um møguliga samanlegging. Tá var eingin áhugi frá teirra síðu. Vit hava so aftur gjørt eina roynd. Tveir góðir og positivir fundir hava verið okkara millum, men enn er ov tíðliga at siga, hvat og um nakað spyrst burtur úr. Men vit vanta og vóna at fáa tosa okkum til rættis soleiðis, at øll handverkarafeløgini vera saman aftur í einum meginfelag, livst so spyrst. Tað hevði undir øllum umstøðum verðið ein stórur siður fyri handverkarastættina um so bleiv.

## Handverksdepilin

Vit kanna í løtuni um tað er skilagott at inniloka eina altan í Handverksdeplinum í Stoffalág, og harvið fáa kjallaran rúmsáttari.

Vit hava havt serkøn at hyggja uppá hetta; og eru teir samdir um, at tað fast mest burtur úr við at inniloka altanina alla sum hon er.

Tað vil siga eisini í erva, og síðani klæða fasaduna framman- og eystanfyri. Hetta verður mett at vera skilabetri og bíligari uppá sikt, og eisini fyri, at bjálva húsi betur tí vit nýta nógva olju at hita húsini við. Ein byggifrøðingur er settur á uppgávuna – at tekna og annað, sum er neyðugt í hesum sambandi. Sjálvandi kostar hetta pengar, men tað er so ikki peningur, sum verður kastaður út av vindeyganum, men tvørturímóti ein virðisøking av ognini.

## Nevndararbeiði

At enda farið eg at nevna, at samstarvið og arbeiði í nevndini – hevur verið – og er fyrimyndarligt. Tað ger tað hugaligt at arbeiði í nevnd felagssins, og hevur stóran týdning fyri felagið.

Okkara dugnaligu starvsfólk eiga eisini tøkk uppiborna fyri gott avrik.

Nú grækarismessa er farin afturum, og vit ganga móti ljósari tíðum, vil eg ynskja okkum øllum eitt gott summar.

www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA




Glarmeistarin v/Poul Guttesen.
Søla og montering av
lágorkutermorútum ,
u-virði niður í 0,4 .
Einkultglas, spegl, herða glas
til brúsu–og glasveggir.
www.glarmeistarin.fo
Alt Glarmeistaraarbeiði verður gjørt. 219466-229466


elmek
v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn
tel 317352 · fax 217700 · elmek@post.olivant.fo
Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl


mazda
Tann nýggi 6'arin er komin
ZOOM-ZOOM
mazda 6
Bilasølan
www.mazda.fo




# Trygvi avger sjálvur kostnaðin

Sum privatkundi í Eik hevur tú tríggjar møguleikar, tá tú skalt flyta pening. Tú kanst biðja okkum gera tað fyri teg, antin umvegis telefon ella við kassan - tað taka vit 25 kr. fyri.

Tú kanst eisini bara flyta peningin við netbankanum. Hjá okkum er netbankin ókeypis at stovna og hava - og við netbankanum kanst tú gera flytingar til kontur í Føroyum og Danmark uttan nakað avgreiðslugjald.

**Les meira á www.eik.fo um hvussu tú brúkar okkum best**

**KOSTNAÐUR FYRI PENINGAFLYTING**
til kontur í Føroyum og Danmark

Við Eik netbankanum
**0,-**

Umvegis telefon
**25,-**

Við kassan
**25,-**

Eik Netbankin

Tel. 348 000 www.eik.fo